## DAGSINS MEINING

# Virðiligur HB dagur í Norðurlandahúsinum

Tvey tey elstu fótbóltsfeløgini í landinum hátíðarhalda 100 ára føðingardag í hesum árinum. Tey eru KÍ og HB. Vit vilja alt fyri eitt ynskja teimum hjartaliga tillukku við vón um mong góð ár aftrat. .

Tað var ein sera áhugaverd og virðilig løta, tá HB hátíðarhelt 100 ára dagin í Norðurlandahúsinum sunnudagin. Havnarfólk og ítróttaráhugað úr øllum landinum fyltu alt húsið henda dagin og man tað vera fyrstu ferð, at ítrótturin hevur átt Norðurlandahúsið so burturav. Ein kann eisini siga, at nú hetta góða hús hevur verið karmur um mest sum øll hugandi tiltøk í samfelagnum, og nú ítrótturin megnaði at fylla karmarnar út henda halgidagin eisini, so er ringurin líkasum sluttaður, sum tikið verður til. Norðurlandahúsið, sum fyrst og fremt er bygt til at hýsa tí vit vanliga skilja við mentan og síðani øllum hugsandi tiltøkum og ráðstevnum, er við hesum seinasta tiltaki sínum nú av álvara vorðið til eitt fólksins hús í breiðastu merking.

Tað verður tó oftani ført fram, at ítrótturin fyllur í so nógv í tí annars lítla føroyska samfelagnum. Tú fær ikki vent tær, ikki blaðað í eini ávís ella tendrað fyri útvarpi og sjónvarpi, uttan at ítrótturin og her serstakliga fótbólturin hevur eina ta hægstu raðfestingina. Tað fellur summum fyri bróstið. Hetta kunnu vit altíð tjakast um, fyri og ímóti. Hinvegin er ikki so lætt heldur at hava eina javnvág í, nettupp tí ítrótturin og her serliga fótbólturin fyllur so ómetaliga nógv í lívinum hjá so mongum. Vit mugu so heldur ikki gloyma, hvussu mong fólk kring alt landið hvønn leygardag og sunnudag leita sær út til fótbóltsvøllirnar at fylgja sínum liðum. Og hvønn týdning hetta hevur reint sosialt og menniskjansliga eisini.

Og hesin áhugi fyri ítróttar- og felagsandanum kom so sannliga til sjóndar í Norðurlandahúsinum sunnudagin, har høvi m.a. var ogna sær tær báðar bøkurnar, sum eru skrivaðar um 100 ára gomlu stríðskempuna og fólkaognina Havnar Bóltfelag. Teir báðir útvarpsmenninir, Jógvan Arge og Súni Merkistein hava ódeyðiliggjørt søguna um henda eina aldursforsetan í føroyska ítróttarheiminum.

Hetta at halda við hesum og hasum er nakað, sum eyðkennir ein stóran part av gerandisdegnum hjá okkum øllum. Vit halda við okkara næsta, við okkara granna, við okkara bygd ella býi, við okkara landi, við okkara flokki osfr. Tað at halda við onkrum er vorðið so gróðurfest í okkum, at tað sæst aftur í gerandisdegnum so ella so. Og tað sást so eisini væl og virðiliga aftur í Norðurlandahúsinum sunnudagin, har yngri, tilkomin og eldri vóru komin saman at gleðast um tað nærum øll hesi halda við, nevniliga HB.

Tað er hugaligt, og tað rørir hjartastreingir at síggja hesi mongu góðu fólk gleðast um tað, sum hetta felag og tey fólk, sum hava stríðst fyri tí øll hesi 100 árini, hava staðið fyri og standa fyri: nevniliga at geva lívinum eisini annað innihald enn arbeiði. At brúka frítíðina til nakað mennandi og skapandi. Í hesi tíðini har vit seta fokus á fólkaheilsuna, eiga vit so sanniliga eisini at hava í huga týdningin sum eitt nú HB hevur fyri somu fólkaheilsu.

Tað skal vera vón okkara, at hetta góða felag og øll tey mongu góðu fólk, sum eru karmurin um hetta felag, hava eydnuna við sær í bæði gaman og álvara. Gott í tykkum. Hjartaliga tillukku enn einaferð.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fyrst børnini, nú tey gomlu

**Okkurt má gerast, so at okkara gomlu, fáa sømulig kor. Tað skilda vit teimum**

**Jan Christiansen**
*borgarstjóri*



VAL04

Lat meg fyrst, enn einaferð vísa á, at barnaansingarøkið er kommunalt, ímeðan eldra økið er 100 prosent landsmál. Vit lovaðu undan seinast vali, at nú var nokk tosað um barnaansingar trupulleikarnar, og at nú skuldi hesin trupulleikin loysast. Lyftið vit góðu er útført, barnaansingartrupulleikin er loystur.

Vit hava staðfest, at landið ikki megnar at loysa sínar trupulleikar viðvíkjandi eldrarøktini, og hevur Tórshavnar Kommuna tikið atlit til hesa støðu. Støðan hjá nógvum gomlum er so vánalig, at sitandi býráðssamgonga beinanvegin fór til verka at hjálpa uppá støðuna. Ellisheim til 10 búfólk er liðugt í Tjarnargari. Dagtilhald er eisini bygt í Tjarnargarði, har 12 familjur kunnu verða avlastaðar í dagtímunum, við tað at tey trygt kunnu lata minnisveiku mammuna ella pápan til fakfólk, sum undir góðum umstøðum kunnu taka sær av viðkomandi. Heim fyri minnisveik er undir bygging við Vallalíð, og um fáar mánaðir er heimið liðugt, so at 16 dement eldri fólk kunnu flyta inn. Somuleiðis er samtykt og peningur settur av til bygging av nýggjum røktarheimi til 24 fólk, sum væntandi er liðugt um eitt ár ella so. Stuðul er somuleiðis givin Alsheimerfelagnum, ið fyrsta dagin lata upp dagtilhald til minnisveik.

Tørvurin er stórur, og eru vit vælvitandi um, at oman fyri nevndi plássini avgjørt ikki nøkta tørvin hjá teimum gomlu. Men skjøtil er settur á, og nú er túrurin komin til tey gomlu.

**Fleiri búmøguleikar**

Tað líkist ongum, at vit í 2004 ikki kunnu veita okkara gomlu búmøguleikar, soleiðis at tey kunnu fáa eina trygga tilverðu teirra seinastu ár. Umráðandi er, at fleiri møguleikar eru at velja ímillum hjá okkara eldra ættarliði, tá tey ikki longur orka at búgva heima.

Smærri tryggar íbúðir til teirra, ið eru frægast fyri. Sambýli til tann, ið ynskir tað, og ellisheim til tey, ikki ikki hava ta stóru røktina fyri neyðini, sum eitt røktarheim kann geva. Ikki er rætt, at gomul dement mugu búgva saman vit teimum, ið hava sítt fulla vit. Tí er avgerandi, at vit bygga heim, ið hóska til okkara gomlu.

Tá Landið ikki orkar at taka á seg uppgávuna, so mugu vit hjálpa til, soleiðis at okkara gomlu borgarar fáa sømulig kor. Tað skylda vit teimum.

Annars haldi eg, at eldraøkið átti at verið lagt út til kommunurnar at umsiti!

# Meira grønt, minni svart

**Birgir Sondum**
*valevni á lista E*



VAL04

Undanfarna býráðssamgonga hevur lagt eftir teimum fáu blettunum í miðbýnum, eitt nú deiliga bønum niðanfyri Mortanstovubrekkuna, sum nú verður gjørdur til P-økið. Eg ætli at arbeiða ímóti, at meira asfalt verður lagt á grønu blettarnar í miðbýnum.

Tað kann ikki vera rætt, at borgararnir skulu bera ótta fyri jørðini býráðið eigur. Vanliga eru tað privat, ið byggja á egnum lendi. Fylgja tey byggisamtyktini, er í lagi.

Í fleiri førum seinasta valskeið, hevur samgongan ikki sjálvt fylgt spælireglunum. Egnar byggisamtyktir eru ikki virdar. Samtyktirnar eru snøgt sagt broyttar til gagns fyri býráðið, eitt nú Vallalíð og Kommunuskúlin.

Aðrastaðni byggja tey bilhús ella P-kjallarar. Hetta kundu vit meira enn so eisini gjørt í Havn. Bilarnir í høvuðsstaðnum verða neyvan færri í framtíðini.

Byggideildin hjá Tórshavnar Kommunu kundi virka væl. Nógv gott fólk er at taka av, og fingu tey arbeiðsfrið, komu óivað fleiri góð uppskot á borðið. Eitt nú uppskot um framtíðar parkeringsmøguleikar í býnum.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Kvøld- og náttarbuss til tey ungu í vikuskiftinum!

**Hjørleif Hjaltalin**
*Valevni fyri Fólkaflokkin til Tórshavnar býráð*



VAL04

Nú nógvir nýggir býlingar eru komnir í Tórshavn, er fjarstøðan millum útjaðaran og miðbýin økt munandi.

Í vikuskiftinum eru ofta ungdómstiltøk í býnum, og sjálvandi hava tey flestu ungu eitt ynski um at luttaka saman við teirra javnaldrum. Nógv av hesum tiltøkum enda aftan á midnátt, og tá skulu tey so heimaftur!

Nógv foreldur hava ampa av hesum, tí hvussu skulu børnini koma út aftur til býlingarnar, tá tiltøkini eru liðug? Foreldrini vilja fegin tryggja sær og vita, at børn teirra kunnu koma trygg til og frá hesum tiltøkum!

Eitt hugskot at loyst henda trupulleika kundi verið ein kvøld- og náttarbussur. Fyri at stytta tíðina , ein bussur nýtur til at koyra runt allan býin, kundi bussurin koyrt á høvuðsvegunum, uttan at fara inn í sjálvar býlingarnar. Ein tílík farleið kundi so nýtt miðbýin sum knútapunkt. Eg ivist ikki í, at nógv ung vildu nýtt henda møguleika. Tey ungu vildu havt eina nógv styttri farleið frá bussinum, enn um tey skuldu gingið frá miðbýnum, og foreldrini høvdu verið munandi tryggari, at latið børn teirra farið til hesi tiltøk!

# Meira um grundstykki í Kollafirði

**Kári Árting**
*Valevni Tjóðveldisfloksins til býráðsvalið í Havn*



VAL04

Undrandi las eg herfyri at varaborgarstjórin roynir at geva mær ábyrgdina av, at eingi grundstykki eru tøk í Kollafirði. Eg kundi takka fyri álitið, men eg haldi at hann lítur alt ov nógv á míni evni og ávirkan, tí eg havi hvørki sitið í bygdaella býráðnum, tíansheldur at eg eigi nakra jørð.

Tað tekur eitt sindur av tíð at fyrireika nýggjar útstykkingar. Men álvaratos, tey 5 komunalu grundstykkini, sum vóru útstykkjað hetta valskeiðið bera ikki brá av politiskum skjótleika.

Vit frøast øll her norðuri um at loyst verður úr lagdi, og at grundstykki fara at vera tøk í næstum. Men tað má ikki støðgast her. Tað eigur framhaldandi at vera arbeitt við tí stóru ætlanini fyri bygdina, í samstarvið við Kollafjarðanevndina, og í samrøðu við okkum, sum búgva her.

# Eldraøkið verður størsta avbjóðingin komandi býráðnum!

**Jógvan Thomsen**
*fólkaflokkurin*



VAL04

Í álitinum um eldraøkið, sum landstýrismaðurin í Almanna-og heilsumálum læt gerða (august 2002), framgongur, at økið í Suðurstreymi yvirhøvur er ringast fyri, tá hugsað verður um tørvsfullna í mun til búpláss. Harumframt staðfestir álitið, at tørvurin eftir 2004 helst fer at økjast munandi í mun til restina av landinum. Bætar eru gjørdir síðan 2002, harav nevnast kunnu heimið fyri minnisveik í Vallalíð og Tjarnagarður við tilbygningi. Tó er langt eftir á mál.

Tórshavnar Kommunu eigur tí í næsta valskeiði, at fáa framt tær íløgur í serstovnar og búpláss, sum eru neyðug, soleiðis, at tey, sum hava hjálp fyri neyðini framvegis kunnu hava ein nøktandi gerandisdag og eitt lív við innihaldi, hóast lívið er farið at halla.

Tá hesi viðurskifti eru fingin til vega, eigur Tórshavnar kommuna at virka fyri, at raksturin av eldraøkinum verður fluttur frá landinum til kommunurnar og skattabýtið ímillum land og kommunu tillagað samsvarandi. Tað fer at staðfesta, at ábyrgdin fyri teimum eldru liggur hjá kommununi og bert hjá kommununi.

Uppgávan hjá kommununi verður tá at taka avgerð um framtíðarbygna, tíðarætlan, fíggjarætlan og aðrir staklutir á eldraøkinum, so farast kann til verka undir skipaðum viðurskiftum.

Hetta er umráðandi, tí talan er um tíðandi pengaupphæddir, sum skulu til, fyri at røkka einum nøktandi tænastustøði á eldraøkinum.

# Kristiliga Sangkórið venjing

**TÍÐINDASKRIV**
*frá Kristiliga Sangkórinum*

Kristiliga Sangkórið byrjar venjingina aftur týsdagin 19. okt. kl. 19.30. Vant verður til eina jólaskrá. Kórið hevur síðan byrjan havt eina jólakonsert í Havnar kirkju beint fyri jól á hvørjum ári og soleiðis verður eisini í ár. Harafturat skal kórið syngja jólaløg við ymisk høvi í býnum fyri jól.

Nýggir kórlimir eru vælkomnir. Sungið verður í KFUM hvørt týskvøld kl. 19.30–21.30.

# Skattalættin ikki teknisk roknivilla, men politiskt feilskot

**Høgni Hoydal**



Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Bárður Nielsen, viðgongur nú, at hann hevur gjørt eina tekniska roknivillu í sambandi við nógv umrødda skattalættan hjá sambandssamgonguni.

Tað er onki nýtt. Tjóðveldisflokkurin hevur áhaldandi víst á, at tøl hjá hesi sambandssamgonguni verða slongd út sum best ber til - og onki hongur saman á botnlinjuni. Hetta hevur longu elvt til, at øll, sum skulu virka og gera íløgur í hesum landi, hava sett seg at bíða og vita hvørki út ella inn. Ongin veit, hvat fer at henda við fíggjar- og búskaparpolitikkinum. Og landsstýrið veit tað ikki sjálvt.

**Skammiliga asosialt**

Nógv verri enn tekniskar villur er tað, at skattalættin er eitt tað grovasta politiska feilskotið og eitt tað mest asosiala tiltakið, ið er lagt fram í Føroyum - enntá vælsignað av Javnaðarflokkinum.

Skattalættin fer at geva einum væl bjargaðum persóni sum undirritaða ella løgmanni góðar 43.000 krónur í skattalætta um árið. Meðan ein vanlig verkakvinna ella ein arbeiðsmaður fer at fáa góðar 2000 kr. um árið. Ongin ivi er um, at prísvøkstur fer at eta alt upp hjá verkafólkinum, meðan vit vælbjargaðu kunnu fara eina luxusferð kring knøttin fyri gávuna frá javnaðarflokkinum.

**Sjálvbjargnið fokið**

Harafturat ger skattalættin hjá sambandssamgonguni, at vit ikki megna at fíggja eitt samhaldsfast samfelag í Føroyum. Vit verða aftur heft at donskum pengum og kunnu halda fram at siga, at vit ikki megna at bera okkara egnu vælferðartænastur uttan danska hjálp. Vit vælbjargaðu skulu sleppa undan at fíggja vælferðina í Føroyum og heldur gera okkum til stakkaladýr, ið noyðast at hava blokk úr Danmark.

**Undirskot til at venda aftur í fortíðina**

200 milliónir í undirskoti á fíggjarlógini tvær reisur á rað uppá bara sjey mánaðir, er triðja avleiðingin av politiska feilskotinum hjá samgonguni. Bert við at taka av skattalættan, studningin til rækjuflotan og at leggja barsilsskip-anina til arbeiðsmarknaðin, hevði úrslitið nærkast javnvág. Undirskot á fíggjarlógini kann vera skilagott, um tú gert íløgur í framtíðina, sum skapa nakað nýtt. Sambandssamgongan hevur undirskot fyri at venda aftur til fortíðina.

**Sparingar har garðurin er lægstur**

Og hvør ber sparingarnar, sum so nógv verður tosað um? Samgongan sparir bara har, sum ongin sterkur bólkur er at trýsta og gera malør. Bara har hon heldur, at hon sleppur lættast ígjøgnum.

Sparingarnar í miðfyrisitingini hava ikki rakt nakran stjóra ella deildarstjóra. Tað eru skrivstovufólk og teir fulltrúar, ið skulu gera fótarbeiðið, sum rúka.

Og so eru tað feløgini hjá brekaðum, orðabókagerð, gransking og mentan, sum verða rakt sera meint.

**Breiðar semjur til breiðar herðar**

Tann breiða samgongan hevur higartil fingið breiða semju um eitt: Tær breiðastu herðarnar skulu sleppa undan at bera byrðarnar.